# Sjeynda árið uttan ávirkan

LANDSFUNDUR
*Eirikur Lindenskov*

Síðani heimastýrislógin kom í gildi í 1948 hava verið hildin 15 løgtingsval. Hetta valskeiðið er sostatt tað 16. í røðini, har politisku flokkarnir í Føroyum hava skipað samgongu við fleiri flokkum. Oftast við trimum flokkum, onkuntíð við fýra flokkum. Tvær verðir hava tveir flokkar skipað landsstýri, í 1950 og í 1990.

Síðani vit fingu heimastýrisskipanina í 1948, er tað bara hent einaferð áður, at Javnaðarflokkurin hevur sitið so leingi uttan fyri politiska ávirkan. Tað var aftan á valið í 1950. Javnaðarflokkurin var í fyrsta landsstýrinum frá 1948-50 saman við Sambandsflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum. Eftir valið í 1950 hildu Javnaðarmenninir, at alt var leyst og liðugt, og at samgongan kundi halda fram, tá Sambandsflokkurin boðaði teimum frá, at hann hevði skipað samgongu saman við Fólkaflokkinum. Hendan samgongan helt fram í 1954, tá teir fingu Sjálvstýrisflokkin aftur at sær.

Í 1958 vann Javnaðarflokkurin stórsigur á løgtingsvalinum, og varð gamla samgongan frá 1948 endurskipað, men hesaferð undir leiðslu av Javnaðarflokkinum, sum á fyrsta sinni fekk løgmann, Petur Mohr Dam.

Javnaðarflokkurin fekk sítt besta úrslit nakrantíð á valinum í 1962, hóast tingmannatalið var tað sama. Flokkurin fekk tá 27,6% av atkvøðunum, men endaði tó aftur í andstøðu, tá Sjálvstýrislandsstýrið varð skipað. Men eftir valið í 1966 kom flokkurin aftur í landsins leiðslu, og sat hann við róðrið fram til valið í úrstíð í 1980, í 16 ár. Tað er tað longsta samanhangandi skeiðið nakar flokkurin hevur sitið við landsins leiðslu. Her skal tó viðmerkjast, at tá Petur Mohr Dam doyði í 1968, tók Kristian Djurhuus, varaløgmaður, úr Sambandsflokkinum við løgmansstarvinum til valið í 1970, tá Atli Dam gjørdist løgmaður. Eftir valið í 1980 skipaði Sambandsflokkurn landsstýri við Paula Ellefsen sum løgmanni.

Javmaðarflokkurin kom aftur í landsstýrið eftir valið í 1984 við Atla Dam sum løgmanni. Men hendan samgongan misti meirilutan við valið í 1988, tá Jógvan Sundstein úr Fólkaflokkinum gjørdist løgmaður.

Í 1990 vann Javnaðarflokkurin stórsigur og fekk 10 fólk vald á ting. Javnaðarflokkurin fekk hesaferð 0,1% minni undirtøku enn í 1962.

Hóast flokkurin so harafturímóti fekk størsta ósigurin nakrantíð í 1994, tá flokkurin misti helvtina av tingmanningini – og fekk á leið sama valúrslit sum í 1936, so helt flokkurin fram í samgonguni eftir valið í 1994 – undir leiðslu Sambandsfloksins.

Men flokkurin valdi at fara úr samgonguni í 1996 og fara í andsstøðu, og har situr hann enn…



*Frá landsfundi Javnaðarfloksins í læraraskúlahøllini í Havn í 1998*

Javnaðarflokkurin landsfund í Havn:

# Limirnir sleppa til orðanna

**Jóannes Eidesgaard væntar sær eitt hugsjónarligt orðaskifti á landsfundi Javnaðarflokkinum um vikuskiftið, tá flokkurin m. a. skal kjósa sær nýggjan floksskrivar og ein nýggja starvsnevndarlim**



*Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, skal m. a. greiða landsfundinum frá, hví flokkurin nú á sjeynda ári situr uttan ávirkan á landsins stýri*

LANDSFUNDUR
*Eirikur Lindenskov*

Um vikuskiftið hevur Javnaðarflokkurin árliga landsfundin í Lærarasкúlahøllini í Havn. Á skránni er m. a. val av starvsnevnd, eins og dagsins politisku mál verða umrødd. Eisini verður kósin løgd fyri framtíðar politikki floksins.

Fundurin byrjar í kvøld, fríggjakvøld, kl 19:30, har fólk verða móttikin við hugnaligum tónleiki. Kl. 20 fer Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka at halda røðu. Hann er gestarøðarin hesaferð.

Tá gestarøðarin er liðugur, fer floksskrivarin at greiða frá virki starvsnevndarinnar í farna ári. Hetta er seinasta frágreiðing hjá sitandi floksskrivara, Eyðólvi Dimon, tí hann hevur gjørt av ikki at stilla uppaftur til valið, sum verður í morgin, leygardagin. Eyðólvur Dimon hevur sitið sum floksskrivari síðani 1991.

Innkomin eru tvey uppskot til nýggjan skrivara, tey eru fyrrverandi løgtingsmaðurin í Vestmanna, Hans Pauli Strøm og Anna Johannesen, fyrrverandi formaður í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag. Hvør teirra verður floksskrivari, ger landsfundurin av í morgin, har limafeløgini greiða atkvøðu – alt eftir hvussu nógvar limir feløgini hava. Einstakir limir í feløgunum kunnu eisini biða um sjálvir at greiða atkvøðu, men tá skulu teir verða 10 limir um hvørja atkvøðu.

Onnur broyting í starvsnevndini verður, at Ragnhild Olsen, sum er umboð hjá Sosialistiskum Ungmannafelag í nevndini, ikki stillar uppaftur, tí hon ætlar sær uttanlands í lestrarørindum. Í hennara stað hevur SU skotið upp at velja formannin í SU, Kristoffur Gaardlykke úr Miðvági.

Seinasta punktið á skránni í kvøld verður, tá einstøku limafeløgini í Javnaðarflokkinum fara at greiða landsfundinum frá virkseminum seinasta árið. Í morgin, leygardagin, kl 9 verður fundurin tikin uppaftur. Tá fer Atli Dam, fyrrverandi floksformaður, at hava minningarorð yvir Kára D. Petersen, sum doyði í summar.

– Kári var í nógv ár starvsnevndarlimur og floksskrivari hjá Javnaðarflokkinum, eins og hann eisini var hollur ráðgevi øll árini, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins.

Næsta punktið á skránni leygarmorgunin verður formansfrágreiðingin, har Jóannes Eidesgaard skal greiða limunum frá báðum valunum, ið verið hava, fólkatingsvalinum og løgtingsvalinum, sum ikki góðu Javnaðarflokkinum neyðugu undirtøkuna, so flokkurin aftur kundi fáa ávirkan á landsins politikk. Somuleiðis skal floksformaðurin royna at greiða frá, hvussu tað ber til, at Javnaðarflokkurin jú í seks ár hevur sitið uttan ávirkan á landsins stýri, og hvussu hann ætlar, at flokkurin skal koma sær úr hesi støðu.

Frá kl 10-12 verður aðalorðaskifti.

– Her er ætlanin, at fólk skulu kunnu sleppa at siga tað, tey hava hug til. Vit verða viðhvørt hartað fyri, at fólk ikki eru sloppin fram við tí, tey hava í huga, og tí hava vit valt at hava orðið frítt á henda hátt, sigur Jóannes Eidesgaard.

Eftir døgurðasteðgin verða temaorðaskifti, har tingmenninir fara at leggja fyri við uppleggi um ymisk evni. Kristian Magnussen fer at leggja fyri arbeiðsloysisskipan, Katrin Dahl Jakobsen fer at tosa um fjølmiðlaskatt o. o. viðurskifti í hesum sambandi. Gerhard Lognberg hevur upplegg um, hvør ið skal hava ábyrgdina av umhvørvisøkinum. Andreas Petersen fer at tosa um bíðilistarnar á sjúkrahúsunum og um sjúkraviðgerð uttanlands. Henrik Old at tosa um vinnupolitikk – m. a. fer hann at tosa um avmarkingar hjá vinnuni, t. d. um bip-støð og um tað, at fiskurin skal um ávísa havn.

At enda fer Vilhelm Johannesen at leggja upp til orðaskifti um fíggjarpolitikk og viðurskifti í hesum sambandi – ella um »skerdan blokk og sperda fíggjarlóg« sum hann hevur nevnt tað.

Jóannes Eidesgaard væntar, at orðaskiftið endar einaferð um fýratíðina seinnapartin. Tá skal fundurin so gera eina fundaryvirlýsing og velja umboðini í starvsnevndina.

– Landsfundurin er eitt sera týðandi forum hjá okkum – ikki minst hjá okkum aktivu politikarum, tí okkum tørvar sambandi við limirnar fyri á tann hátt at motivera okkum til dagsins politikk, sigur Jóannes Eidesgaard, sum eisini á landsfundinum ætlar sær at leggja upp til eitt hugsjónarligt orðaskifti, sum hann heldur verða rættuliga tiltrongd, ikki minst eftir kjakið seinastu tíðina, sum hevur borið brá av, at ávísir samfelagsbólkar skulu útihýsast.

# Astrup heldur røðu á landsfundi Javnaðarfloksins

LANDSFUNDUR
*Eirikur Lindenskov*

Fyrstu at taka orðið á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum í høllini á Læraraskúlanum í kvøld verður Jørn Astrup Hansen, forstjóri í Føroya Banka.

Javnaðarflokkurn hevur boðið honum at verða gestarøðari á fundinum.

– Hann ger sjálvur av, hvat hann fer at tosa um, og tað er eisini ætlanin, at hann skal siga tað við okkum, sum honum lystir – vit hava bara biðið hann hugleitt um samfelagsviðurskifti, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins.



*Á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum fer Jørn Astrup Hansen at hugleiga um samfelagsviðurskifti*

– Eg rokni tó við at hann fer at nema við privatiseringar, at tosa um kvotaskipan og tilfeingisrentu, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaður Javnaðarfloksins sigur, at Jørn Astrup Hansen er ein áhugaverdur maður. Hann kom her í svárastu krepputíð og hevur stýrt bankanum úr kreppuni til tað, hann er í dag.

– Tað verður áhugavert at hoyra hann lýsa, hvussu hann hevur upplivað samfelagsbroytingarnar hesi árini, sigur Jóannes Eidesgaard.



# Landsfundur '02

## verður á Læraraskúlanum fríggjadagin og leygardagin við hesi dagsskrá:

sí www.javnadarflokkurin.fo

### Fríggjadagin 8. november

| | |
|---|---|
| kl. 19.30 | **Landsfundurin settur**<br>Góðkenning av fundarskipan<br>Val av fólki til fundarskipan |
| kl. 20.15 | **Gestarøðari**<br>Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka |
| kl. 21.00 | **Frágreiðing skrivarans**<br>Orðaskifti um frágreiðingina |
| kl. 21.30 | **Frágreiðing frá feløgnum** |
| kl. 23.00 | **Fundur niðurlagdur** |

### Leygardagin 9. november

| | |
|---|---|
| kl. 09.00 | **Formansfrágreiðing** |
| kl. 10.00 | **Aðalorðaskifti** |
| kl. 12.00 | **Matarsteðgur** |
| kl. 13.00 | **Tema orðaskifti**<br>· ALS v/ Kristian Magnussen<br>· Hvør hevur ábyrgdina av umhvørvinum v/ Gerhard Lognberg<br>· Fjølmiðlaskattur v/ Katrin Dahl Jakobsen<br>· Forðingar í vinnuni v/ Henrik Old<br>· Bíðilistar og sjúkraviðgerð uttanlands v/ Andrias Petersen<br>· Skerd heildarveiting - sperd fíggjarlóg v/ Vilhelm Johannesen |
| kl. 15.00 | **Val av starvsnevnd, floksleiðslu og ásetan av limagjaldi** |
| kl. 16.00 | **Ymiskt - Innkomin uppskot** |
| kl. 16.30 | **Landsfundarsamtykt** |
| **kl. 20.00** | **Veitsla**<br>Trio spælir til dans<br>Tilmeldin á tel. 226692 ella 225344<br>Kostnaður kr. 150,- |



## Føroya Javnaðarflokkurin